

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 06 - 2012

# Føroyingur valdur í nevnd Sameindu Tjóða

Í dag varð Martin V. Heinesen valdur sum limur í landgrunsnevnd ST (Commission on the Limits of the Continental Shelf) í eitt fimm ára skeið. Hann var uppstillaður sum valevni fyri Kongsríki Danmarkar við stuðuli frá øllum Norðurlondunum skrivar heimasíðan hjá Løgmansskrivstovuni. Landgrunsnevndin varð sett á stovn við støði í havrættarsáttmála ST. Uppgávan hjá nevndini er at viðgera landgrunskrøv hjá strandalondum og gera tilmæli um teirra landgrunsmørk uttan fyri 200 fjórðingar. Landgrunsnevndin hevur sæti í New York og arbeiðir har millum 21 og 26 vikur um árið. Teir 21 limirnir í landgrunsnevndini eru serfrøðingar í jarðfrøði, jarðalisfrøði og hydrografi. Teir verða valdir úr ymsum heimspørtum fyri at tryggja eina geografiska javnvág. Martin er 58 ára gamalur. Hann hevur starvast sum leiðari á Jarðfrøðisavninum, og í 1990-árunum var hann limur í Oljuráðleggingarnevnd landsstýrisins og stjóri á Oljufyrisitingini, og hann var limur í nevndini, sum samráddist við Bretland um landgrunsmarkið. Síðan 2003 hevur Martin verið leiðari fyri landgrunsverkætlanini, sum fyrireikaði landgrunskrøvini út um 200 fjórðingar norðan og sunnan fyri Føroyar. Hesi vórðu latin ST í ávikavist apríl 2009 og desember 2010. Landsstýrið kann saman við øllum londum, ið hava stuðlað Martini V. Heinesen við at velja hann í hesa týdningarmiklu nevnd, frøast um, at hollu royndir og eldhugi hansara nú eisini kunnu koma arbeiðinum hjá landgrunsnevnd ST til góðar. Meira fæst at vita við at venda sær til Herálv Joensen, deildarstjóra á tlf. 556102